norden

Nordplus Vaksin

# Stuðul frá Nordplus - Vaksin

**Nordplus vaksin er ætlað at menna samstarvið fyri fólksliga upplýsing og undirvísing av vaksnum.**

Stuðul verður veittur til flytføris- og samstarvsverkætlanir, sum kunnu menna nýggj hugskot, háttaløg (metodur), tilfeingi, partar av skeiðum o.tl. Bæði luttakarar og lærarar kunnu vera við í samstarvinum. Harafturat verður stuðul veittur til at kunna um royndir hjá hvørjum øðrum, til kortlegging og útgreining av ávísum økjum og til at byggja nýggj netverk upp.

- Stuðul kann td. vera veittur til fyrireikingar til verkætlanir at fyrireika vitjan hjá undirvísarum og øðrum við ábyrgd fyri frálæru.
- Stuðul kann vera veittur til uppihald í samband við eftirútbúgving, lestur ella undirvísing hjá lærarum og øðrum og til skifti millum luttakarar í fólkaupplýsing og í undirvísing fyri vaksin

**Umsóknarfreistirnar til Nordplus Vaksin eru 1. mars og 1. okt. 2006**

*Umsóknarfreistirnar til hinar fýra Nordplus-skipanirnar eru:*
Nordplus Junior – Umsóknarfreistir: 15. mars 2006
Nordplus Granni – Umsóknarfreistir: 1. februar 2006
Nordplus Mál – Umsóknarfreistir: 1. februar og 15. okt. 2006
Nordplus – Umsóknarfreistir: 1. februar 2006

Meiri fæst at vita á www.ciriusonline.dk/nordplus-voksen ella hjá Altjóða Skrivstovuni í Tórshavn. Tlf. 322065 - e-mail: ask@ask.fo · www.ask.fo

norden

Nordplus

# Stuðul frá Nordplus

**Nordplus er ein skipan fyri studentar, lærarar og fyrisiting innan hægri útbúgvingar í Norðurlondum.**

Nordplus skipanin skal fremja almenning, kjølfesti, menning og fakligt innihald í netverkum millum universitet og aðrar útbúgvingarstovnar í Norðurlondum – í fakligum eins og tvørfakligum høpi – og skal fremja flytføri hjá lesandi og lærarum í Norðurlondum.

**Raðfestingar í 2006:**
Náttúruvísind, felags útbúgvingarskráir, samstarv millum útbúgvingarstovnar og vinnulív, nýskapan.

**Nýtt:**
Nú er ikki krav um avriksflutning (merit) í samband við praktikk uppihald.
Flytføri hjá lærarum: Minstakravið er ein vika ella 8 undirvísingartímar.

**Umsóknarfreistin er 1. februar 2006**

*Umsóknarfreistirnar til hinar fýra Nordplus-skipanirnar eru:*
Nordplus Vaksin Umsóknarfreistir: 1.mars og 1.okt. 2006
Nordplus Granni Umsóknarfreistir: 1. februar 2006
Nordplus Mál Umsóknarfreistir: 1. februar og 15. oktober 2006
Nordplus Junior Umsóknarfreistir: 15.mars 2006

Meiri fæst at vita á: www.ciriusonline.dk/nordplus ella hjá Altjóða Skrivstovuni í Tórshavn.
Tlf. 322065 – e-mail: ask@ask.fo · www.ask.fo

# Leiðari til barnagarðin á Gásamýri

Leirvíkar Kommuna søkir eftir dagstovnaleiðara til barnagarðin at byrja 1. februar 2006.

Arbeiðið er 40 tímar um vikuna og umsøkjarin skal hava námsfrøðiliga útbúgving.

Ì barnagarðinum á Gásamýri eru 32 børn í aldrinum 3-6 ár og í frítíðaransingini eru 24 børn, sum ganga í 1. og 2. flokki.

Vit ynskja at tú:
- hevur hug og hegni at leiða, dugir at samskipa og ert fyrikomandi
- hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu
- hevur hug til at skapa og seta dám á okkara barnagarð
- kanst arbeiða sjálvstøðugt.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 443006.

Umsókn við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi **týsdagin 20. desember 2005.**

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

# Regluligu bygdaráðsfundir 2006

Kunngjørt verður, at bygdaráðið hevur á fundi 2. desember 2005 samtykt, at almennu fundirnir fyri árið verða hildnir á kommunuskrivstovuni kl. 19, hesar dagar:

| | |
|---|---|
| Mánadagin | 16. januar |
| Mánadagin | 13. februar |
| Mánadagin | 13. mars |
| Mánadagin | 24. apríl |
| Mánadagin | 22. mai |
| Mánadagin | 19. juni |
| Mánadagin | 14. august |
| Mánadagin | 18. september |
| Mánadagin | 9. oktober |
| Mánadagin | 30. oktober |
| Mánadagin | 20. november |
| Fríggjadagin | 8. desember (kl. 16) |

Mál, sum ynskjast viðgjørd á bygdaráðsfundi, mega verða kommununi í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

**Kvívíkar kommuna**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Beinleiðis samband við Barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu tlf. 302060

Í sambandi við at nýggj barnaverndarlóg kemur í gildi, hevur Tórshavnar kommuna, fyri at betra um tænastustøðið mótvegis borgaranum, gjørt av at hava beinleiðis telefonlinju til barnaverndartænastuna í kommununi.

Nýggja telefonnummarið hjá barnaverndartænastuni er 302060, og er telefontíðin mánadag til hósdag frá kl. 9:00 til 16:00 og fríggjadag frá kl. 9:00 til 15:00.

Áftaná arbeiðstíð ber til, í neyðsynjarørindum, at fáa fatur á barnaverndartænastuni á telefon nr. 216012



# Sethús á Signabø til sølu



Sethúsið er bygt í 1989 og hevur nýggjan klædning við breiðum profilbrettum frá 2003. Húsið liggur við blindveg og er útsýnið gott út á fjørðin. Til húsið hoyrir urtagarður og er stoyptur garður um ognina.

| | |
|---|---|
| **Adressa:** | Gerðisvegur 2, 416 Signabøur |
| **Støðd á húsum:** | 155 m² + loft 105 m² |
| **Loft:** | Stor stova, 2 kømur, gymslurúm |
| **Miðhædd:** | Rúmligur køkur, stova, hjúnarrúm, 2 kømur, durur, gongd, wc/bað, bryggers og fýrrúm |
| **Kjallari:** | Krúpikjallari |
| **Støðd á grundøki:** | 601 m² |
| **Byggiár:** | 1989 |
| **Yvirtøkudagur:** | Eftir avtalu |
| **Kostnaður:** | Kr. 1.305.000,- |

*Áhugað verða biðin um at ringja ella støkka inn á gólvið hjá Húsamekling. Her kunnu vit greiða nærri frá ognini, og avtala tíð at sýna húsini fram.*

**HÚSAMEKLING**

Sp/f Protek · Vagli · Box 331 · 110 Tórshavn
Tel 319321 · Fax 319331 · e-mail: protek@post.olivant.fo

Sosialurin 341800